**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 12 |
| Tíð: | 02.12.2021 kl. 13.00. |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Petur Rouch, skrivari, Marin Rasmussen, limur og Ingigerð á Trøðni, varalimur.

**Fundarskrá:**

1. Fundur við Landsfelag pensjónista
2. Viðmerkingar frá Eldraráðnum

<u>AD 1 Fundur við Landsfelag pensjónista</u>

Endamálið við fundinum við Landsfelag pensjónista er at verða við at mynda skránna á ráðstevnu, sum verður í Norðurlandahúsinum hin 15. mars 2022. LP skipar fyri ráðstevnuni, sum er um kor teirra eldru í Føroyum. Fundurin er landsdekkandi, og tey høvdu sent okkum eina fyribilsskrá. Hon var lisin og vit høvdu ymsar viðmerkingar, men vit fegnaðist um fyribilsskránna, og vit meta, at tiltakið er alneyðugt.

<u>AD 2 Viðmerkingar frá Eldraráðnum</u>

Klokkan 13:30 komu Beata Samuelsen og Gunnleyg Durhuus frá LP á fundin og vit høvdu eitt gott prát, har okkara ynskir vóru væl móttikin. Ráðstevnan 15. mars byrjar klokkan 10 og endar klokkan 16.

Eftir fundin fingu vit vitjan av nýsetta leiðaranum í Tilhaldinum og vit fingu eitt gott og gevandi prát við hann.

Fundur lokin klokkan 15:00

Skrivað tann 17. Desember 2021.

Petur Rouch,
skrivari